gult cyan magenta svart



## Stórur áhugi fyri nýggjárs-konsertini

**Ongantíð áður eru so nógv atgongumerki seld í forsølu til eina nýggjárskonsert, sum hana í ár**

Áhugin fyri ársins nýggjárskonsert er stórur. Fleiri enn 600 atgongumerki eru seld í forsølu, og tað er óvanliga nógv.

Frændur eru høvuðsnavnið á nýggjárskonsertini, sum verður fríggjakvøldið í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Umframt Frændur verður eisini eitt so kallað Hit Show 2000, har plátuvendarar fara at spæla best umtóktu sangirnar frá árinum, sum nú fer aftur um bak.

### Eisini á Kambsdali

Frændur venur um dagarnar í Klaksvík, og manningin, sum hesaferð fer at spæla saman við teimum trimum frontmonnunum, Steintór Rasmussen, Eyðun og Rana Nolsøe, eru Erik Biskopstø, Ingi Isaksen og Høgni Klakkstein.

Frændur fer at spæla sangir frá øllum sínum útgávum síðani 1984, tá millum annað Hundurin Brúni kom goyggjandi inn á føroyska tónleikapallin.

Leygarkvøldið verður sama konsert - við Frændum og Hit Show 2000 - í ítróttarhøllini á Kambsdali.



*Best umtókti føroyski tónleikabólkurin, Frændur, spæla í kvøld og í annaðkvøld til konsert*

# Far á skaðastovuna

**Fólkaskaðarnir, ið kunnu standast av fýrverki, eru ikki at undirmeta. Eitt brandsár er ikki altíð so álvarsligt at síggja til, og ein hond kann síggja óskadd út eftir eina spreinging. Men ofta er skaðin størri enn hann sær út, og tí eiga fólk altíð at fara á skaðastovuna, um tey koma til skaða av fýrverki**



FÝRVERK
*Rúnar Reistrup*

Tað er eingin grund til at ræðast fýrverk, tí um rætt verður atborið, er lítil og eingin vandi fyri at nýggjársritualið við at heilsa nýggja árinum vælkomnum við krúti gerst annað enn ein góð uppliving.

Men hvørt ár um nýggjársleitið fáa skaðastovurnar í landinum vitjan av fólki, ið annaðhvørt hava verið óansin ella bara óheppin og hava fingið størri og smærri skaðar av fýrverki. Oftast er talan um fólk, ið hava fingið brandsár, men tað kemur eisini fyri at fólk fáa eygnaskaðar, hoyriskaðar ella hava meislað ella mist limir.

### Fyribyrg

Tað, sum eigur at liggja fremst í huganum í sambandi við skaðar av fýrverki nýggjársaftan er sjálvsagt fyribyrgingin av skaðum.

Oftast standast skaðarnir av heimagjørdum fýrverki, ið ofta er nógv sterkari enn tað, sum fæst til keyps, og sum av góðum grundum ikki er eins trygt at nýta. Her eiga fólk við einum lítlum kinesara í búkinum at hugsa um, at heimagjørt fýrverk ikki bert kann skaða tann, ið ger fýrverki, men eins væl kann meisla onnur fólk.

Full fólk og børn vísa seg at vera tey vanligastu offrini fyri fýrverksskaðum. Skaðar hjá børnunum kunnu fyribyrgjast við at greiða frá teimum frá vandunum, ikki lata tey í eldfim klæðir nýggjársaftan og keypa teimum verndarbrillur.

### Tá skaðin er hendur

Men tá skaðin er hendur nyttar lítið at hugsað um hvat kundi og burdið verið gjørt. Vanliga er ikki talan um lívshóttandi skaðar, og tí er ikki orsøk at fara í panik. Bestu ráðini eru at koma undir læknahond sum skjótast.

Á skaðastovuni í Havn mæla tey fólki til at møta upp hjá teimum skjótast gjørligt.

– Er talan um brandsár eru bestu ráðini at køla sárið niður beinanvegin, og so koyra tann skadda á skaðastovuna. Tað er umráðandi at fólk ikki undirmeta eitt brandsár, tí hóast tað kanska ikki sær út av so nógvum í fyrsta umfari, so kann søgan væl vera ein onnur næsta morgun. Tí eru bestu ráðini at koma til okkum at fáa sárið kannað - eisini um tað kanska ikki sær so grefligt út, siga tey av skaðastovuni í Havn.

Um eitt fólk fær skaða í eyguni av fýrverki, eru bestu ráðini at halda seg frá at gera nakað sum helst við skaðan, men bara fáa tann skadda á skaðastovuna.

### Hvat ger man við fingurin

Er man so óheppin at okkurt fýrverk brestir so ógvusliga í hondini, at fingrar ella pettir av fingrum skræðast av, ræður um at taka leysu kropspartarnar við sær á skaðastovuna.

– Í Føroyum eru avstandirnir til skaðastovur gjarna so stuttir, at tað ikki hevur tann stóra týdningin, hvussu avskræddir kropslimir verða handfarnir. Men hevur eitt fólk mist fingurin og tað gongur long tíð til tann skaddi kemur undir læknahond, eru bestu ráðini at køla tann mista fingurin. Hetta kann til dømis gerast við at leggja fingurin í ein plastposa og so leggja hendan í ein anna plastposa við køldum vatni. Er stutt á skaðastovuna er ikki neyðugt at køla tann mista fingurin, siga tey á skaðastovuni í Havn.

Tað er tó ikki altíð at tað sæst so væl á hondini, tá okkurt fýrverk er brostið í henni. Men hóast hondin er intakt og sær út til at vera óskødd, so kunnu skaðar væl vera hendir undir húðini.

– Er okkurt brostið í hondini kann tað ofta gera skaða á æðrar og nervar innan fyri húðina, og tí er altíð best at fáa hondina kannaða, um nakað slíkt er hent, eru ráðini av skaðastovuni.

Skaðastovan í Havn plagar ikki at vera øðrvísi mannað nýggjársaftan enn onnur kvøld. Skaðarnir av fýrverki plaga ikki at vera so øgiliga nógvir í tali, men stendur á, eru tilkallivaktir altíð til taks.

# Einki ólógligt fýrverk

**Hvørki í Vágunum ella á Streymoynni eru tollararnir komnir fram á ólógliga innflutt fýrverk. Á Streymoynni hava tollararnir gjørt fleiri stakroyndir enn vanligt nú undan nýggjárshaldinum, meðan tollararnir í Vágunum hava leitað væl verri enn teir plaga**

FÝRVERKA-INNFLUTNINGUR
*Rúnar Reistrup*

Hesa tíðina plaga tollarar onkuntíð at lukta krút í tí viðføri og farmi, sum kemur til Føroya. Í øðrum londum fæst fýrverk til keyps, ið er forboðið at selja í Føroyum, og hetta má sjálvsagt heldur ikki innflytast til Føroya. Men í ár hava tollararnir ikki lagt hald á nakað fýrverk.

Tolleftirlitið í Havn hevur allan hendan mánaðin verið upp á vakt og hevur gjørt fleiri stakroyndir enn vanligt fyri at forða innflutningi av ólógligum fýrverki. Tað er als ikki loyvt at innflyta fýrverk av nøkrum slag til Føroya uttan loyvi frá fútanum, men á Tolleftirlitinum í Havn hava tey tó valt at síggja millum fingrarnar við, at okkurt av ferðafólkunum, ið komu til Føroya við Norrønu undan jólum, hevði lagt sær nakrar rakettir í bilin.

– Vit hava valt at brúkt ta mannagongd tá vit renna okkum í heilt smáar nøgdir av fýrverki, at vit hyggja eftir um talan er um fýrverk, ið annars er góðkent í Føroyum. Um so er, hava vit ikki tikið fýrverkið frá fólki.

### Fáar stakroyndir

Tolleftirlitið á flogvøllinum í Vágum hevur heldur ikki funnið nakað fýrverk í viðførinum hjá teimum mongu jólagestunum. Tað hevur annars verið vanligt at tollararnir á flogvøllinum við jøvnum millumbilum eru komnir fram á ólógligt fýrverk í desember mánaði.

Men á Tolleftirlitinum á flogvøllinum tora tey einki at siga um, hvørt hetta er tekin um at fólk aftra seg við at innflyta fýrverk til landið ella ikki. Vegna tað, sum tollararnir sjálvir meta sum tørvandi arbeiðsorku, hava nevniliga nógv færri stakroyndir verið gjørdar av viðførinum hjá ferðafólki farnu mánaðirnar, enn vanligt var fyrr. Av teirri orsøk ber ikki til at meta um hvussu nógv fýrverk kann vera innflutt ólógliga síðstu tíðina, verður sagt á Tolleftirlitinum á flogvøllinum.



*Savnsmynd*

gult cyan magenta svart



DAGFØR
TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialurin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
Sosialurin
HALT
SOSIALIN
Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar
Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*
Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:
☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.
Sosialurin

Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy
Kaggin
KAGGIN
Fríggja- og leygarkvøldið spælir
ALL THAT RAIN
Nýggjársaftan spælir
ALL THAT RAIN unplugged
frá kl. 00.30
Opið frá 22 til 04
STÓRT MIÐNÁTTAR-FÝRVERK
Nýggjárstónleikur, brúsandi løgir, gløgg o.a.
Mánakvøldið 1. jan. spælir
ALL THAT RAIN
Opið frá 20 til 04
Kaggin
Kaggin
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÝGGJÁRSKONSERT OG DANSUR



FRÆNDUR & HIT SHOW 2000
Fríggjakvøldið 29. des. í ítróttarhøllini á Hálsi
Leygarkvøldið 30. des. í ítróttarhøllini á Kambsdali
frá kl. 23.00-03.45
Atgongumerki á 120,- kr. fáast í forsølu:
3'arin í SMS, Kunningarstovan í Tórshavn, Shell-støðin í Gøtudali, Kiosk Vár í Runavík, Statoil í Klaksvík og Statoil-støðin í Skálabotni
3arin SKÁLKUR Restorffs FØROYA SPARIKASSI
Sosialurin - 311820

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

fk Mat-seðilin
Fríggjadagin 29. desember
**Karbonatir**
Leygardagin 30. desember
**Fleskasteik**
Týsdagin 02. januar
**Kjøtbollar v/karrysós**
Mikudagin 03. januar
**Grýturættur**
*Kostnaður 32.- kr.*
•••
**Seinnaparts-tilboð**
*frá kl. 14.00:*
**Juniorburgari 14,95**
**Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95**
Matstovan í Hoyvík

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Eysturoy
Nýggjárs-aftansdansur
Á STRONDUM



Dansur við góðum dansitónleiki verður á Strondum nýggjársaftan 31. des.
Audio spælir.
Matstovan verður opin
STRÁLAN
Sosialurin - 311820

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

Vilja tygum við í
*Í býin* - **hvønn hósdag**
Ynskja tygum at lýsa í teiginum ***í b‡in***, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720
Tekstur